## Holst kom inn og skoraði

Lyngby spældi leygardagin venjingardyst ímóti svenska felagnum Helsingborg. Hetta var næstseinasta dysturin, áðrenn, danska 1. deild byrjar aftur. Úrslitið av dystinum gjørdist 2-2. Lyngby kom á odda tíðliga í dystinum, men Helsingborg skoraði tvey mál fyri steðgin. Christian Holst Lamhauge byrjaði dystin á beinkinum, men hann kom á vøllin, og hann javnaði fyri Lyngby í seinna hálvleiki.

## Nygaard skoraði tvær ferðir



Álopsspælarin Marc Nygaard, sum hevur ættarbond á Tvøroyri, skoraði leygardagin tvey mál fyri felag sítt Queens Park Rangers. QPR spældi ímóti Leicester í næstbestu deildini, og dysturin endaði við 3-1 til QPR. Fyrra málið hjá Nygaard var við brotssparki til støðuna 2-0. Nakað seinni legði hann QPR á odda 3-0, áðrenn Leicester fekk pyntað um úrslitið. Við sigrinum kom QPR upp um niðurflytingarstrikuna.

VÍF-Kyndil 28-27 (13-18):

# VÍF vann aðalroyndina

**Kyndil førdi stórt at kalla allan dystin, men síðstu 10 minuttirnar vendi VÍF dystinum, og so vunnu teir ein tepran sigur í aðalroyndini undan FM-finaluni, har júst hesi bæði liðini bresta saman**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppdysturin í Atlantic Airways kappingini millum VÍF og Kyndil hevði sum so ikki tað heilt stóra at siga. Tað var longu greitt undan hesum dystinum, at júst hesi bæði liðini skulu møtast í FM-finaluni, og tí var einasti fyrimunurin við einum sigri, at vinnarin slapp at velja, hvar fyrsti finaludysturin skal leikast, samstundis sum vinnarin eisini fær heimadyst í einum møguligum triðja finaludysti.

### Kyndil leyp avstað

Gongdin hevur verið sera góð hjá Kyndili í endaspælinum, meðan úrslitini hjá VÍF ikki hava verið av teimum bestu. Hetta sást eisini aftur í fyrra hálvleiki, tí her setti Kyndil seg á dystin mest sum alt fyri eitt.

Dysturin var bert góðar 10 minuttir gamal, so høvdu teir lagt seg á odda 7-2, og her lá líkasum í luftini, at Kyndil kundi avgera alt beinanvegin. Eftir hetta fótaði VÍF sær tó eitt sindur, men tað var tó enn Kyndil, sum koyrdi á. 10 minuttir seini høvdu teir økt um leiðsluna upp í sjey mál, og her var alt, sum bendi á, at Kyndil fór avstað við øllum úr Vestmanna.

Síðstu tveir minuttirnar undan steðginum bragdaði tó endiliga hjá vestmenningum. Hesa løtuna skoraðu teir tríggjar ferðir, so tá liðini fóru til hálvleiks vóru nú bert fimm mál á muni.

### Eli steðgaði VÍF

Í seinna hálvleiki vóru liðini sum hamskift. Nú var tað brádliga VÍF, sum fekk eina nógv betri byrjan, og tá góðir fimm minuttir vóru spældir, var munurin minkaður niður í tvey mál, og nú var alt brádliga rættiliga opið aftur.

Kyndil svaraði tó skjótt aftur, og tá seini hálvleikur var hálvrunnin, høvdu teir enn einaferð vunnið sær eina trygga leiðslu. Nú førdu teir aftur við seks málum, og her tóktist dysturin helst í roynd og veru avgjørdur, tí Kyndil var rættiliga nógv betri hesa løtuna.

Men brádliga steðgaði alt upp hjá Kyndil, og serliga Eli Müller í VÍF-málinum fór at spæla væl. Síðsta korterið lat hann bert tvey mál ígjøgnum, og spakuliga ótu vestmenningarnir meir og meir av kyndilsleiðsluni. Tá fimm minuttir vóru eftir, komu teir uppá javnt fyri fyrstu ferð í seinna hálvleiki, og næstu løtuna megnaðu teir eisini at leggja seg á odda við tveimum, og endin av tí heila var, at VÍF vann dystin við einum máli. Tíverri fyri teir fekk Eli reyða kortið móti endanum av dystinum, tá hann í gleðisrúsi sparkaði bóltin upp í loftið. Sostatt verður hann ikki við í fyrsta finaludystinum.

# Eli sá reytt

**Í gleðisrúsi eftir eina bjarging í seinastu sekundunum sparkaði Eli Müller hjá VÍF bóltin upp í loftið í dystinum ímóti Kyndli, og hetta mettu dómararnir til eitt reytt kort. Sostatt verður Eli ikki við í fyrsta finaludystinum í Atlantic Airways kappingini ímóti júst Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Eli Müller staðfesti sjálvur eftir dystin, at talan var um býtta gerð, tá hann í gleðisrúsi um seinastu bjargingini sparkaði bóltin upp undir lofti*
*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

Kyndil førdi at kalla allan dystin í Vestmanna sunnudagin, har teir vóru á vitjan hjá VÍF í seinasta umfari av Atlantic Airways kappingini hjá monnum. Bæði VÍF og Kyndil høvdu tryggjað sær luttøku í FM-finaluni undan dystinum, og tí hevði hesin dysturin ikki tann heilt stóra týdningin. Síðstu 10 minuttirnar av dystinum kom VÍF tó væl aftur, og at enda megnaðu teir eisini at vinna dystin við einum máli.

Hetta var ikki minst takka verið eina vælleikandi Eli Müller í málinum, men longu nú er greitt, at Eli ikki stendur í málinum í fyrsta finaludystinum ímóti Kyndli. Hann fekk nevniliga reytt kort í seinastu sekundunum av dystinum í gjár. Vit hava spurt Eli, hvat tað var, sum hendi.

- Eg bjargaði eini roynd frá Róki í seinastu sekundunum, og bólturin støkk út ímóti teirra høgra vongi. Hann hevði tó neyvan nakran møguleika at fáa bóltin, so í einum gleðisrúsi sparkaði eg bóltin upp í loftið, í staðin fyri bara at taka hann upp í hendurnar. Dómararnir góvu Eli reytt kort fyri hendingina, og Eli metti sjálvur, at hetta var rættiliga býtt gjørt av honum.

– Hatta var sjálvandi ótrúliga býtt av mær. Eg skuldi ikki havt gjørt hatta, men eg var bara so glaður um at fáa sigurin eftir at hava verið so langt aftanfyri. Eg kann tó ikki siga nógv um reyða kortið, tí tað er helst í lagi. Hatta er helst tað man kallar ósportlig upptraðkan, og so skal man hava reyða kortið, staðfesti ein heldur skuffaður Eli Müller eftir dystin.

Reyða kortið ger, at Eli ikki verður tøkur til fyrsta finaludystin, sum verður í Havn komandi vikuskiftið, og hetta er ein dyggur smeitur hjá VÍF. Teir hava tó ein góðan málmann í Bárði Nielsen á beinkinum, men tað vildi sjálvandi verið betri at havt báðar tøkar til týdningarmikla dystin.

### FAKTA

**VÍF-Kyndil 28-27 (13-18)**
**Málskjúttar:**
**VÍF:** Agnar Joensen 9, Sámal Joensen 7 (2), Áki Olsen 6, John Zachariassen 3, Ingi Olsen 2, Áki G. Olsen 1
**Kyndil:** Hans Áki Dal Christiansen 8 (4), Kenn Zachariassen 5 (5), Rókur Akralíð 5, Janus Einar Sørensen 4, Høgni Klein 4, Ragnar Stakksund 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Kyndil 12
**Útvísingar:** VÍF 7, Kyndil 5
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

# Gunnar vann á fjallasúkklu

**Leygardagin seinnapartin, í vindi, regni og kulda skipaði Tórshavnar Súkklu Felag fyri fjallasúkklukapping yvir 40 km**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Byrjan og mál vóru við Føroya Studentaskúla. Súkklað frá Studentaskúlanum eftir gøtuni niðan á Ringvegin, eftir grasinum til tyrlupallin, oman á Boðanes og so niðan aftur á Ringvegin. Nú gekk so leiðin niðan eftir Ringvegnum, Oyggjarvegnum og út á ríðibreytina, rossagøtuna til Rossafjósini í Havnadali.

Rossagøtan bleiv eisini brúkt á heimvegnum, men nú var farið niðan á oyggj eftir Oyggjarvegnum og rossagøtunum har.

Vent bleiv við Lambafelli, og so við fullari ferð eftir Oyggjarvegnum til Studentarskúlan, har súkklað var 7 ferðir á einum 2,5 km ringleið. Íalt 40 km.

Fyrst varð súkklað ein túr á ringleiðini við Studentarskúlan, og fylgdust allir, men Gunnar Dahl Olsen, Eli Christiansen, Sigmundur Olsson, Samson Nesá og Gudmundur Joensen drógu frá hinum, tá farið var niðan móti Krákugjógv og víðari niðan Oyggjarvegin. Eftir rossagøtuni bleiv spjaðingin størri og størri, við Gunnari á odda. Hinir, Eli, Sigmundur, Samson og Gudmundur komu aftaná, sum perlur á snóri.